# Eftirlýsa vælferðarsamfelagnum

**25 feløg hava nú sent eina eftirlýsing út eftir vælferðarsamfelagnum Føroyar. Feløgini mótmæla harðliga niðurlagingini, ið samfelagið er fyri**

MÓTMÆLI

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



25 feløg mótmæla nú raðfestingunum hjá útinnandi valdinum í landinum.

- Vælferðin hevur ikki fingið nøktandi raðfesting í góðum tíðum, og tá tíðirnar gerast verri, verður vælferðin munandi skerd. Hetta hevur verið serliga ringt seinasta árið, og einki bendir á, at lagt verður á annan bógv, siga feløgini í tíðindaskrivi.

- Tvørturímóti so er nærum hvørja viku, at lagt verður eftir tilboðum ella skipanum, ið fólk hava fyri neyðini. Tað seinasta álopið var á børn við serligum tørvi, og næst á skránni eru tey sálarsjúku. Áðrenn hetta hava pensjónistar, fólk, ið hava tørv á heilivági, børn og ung við serligum tørvi, staðið fyri skotum. At landinum vantar pening er ongin umbering fyri at leggjast á tey, sum mest hava brúk fyri, at vit hava nøkur tilboð, sum kann javnseta borgararnar her á landi, staðfesta feløgini, sum eisini telja stóru fakfeløgini Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag, sum saman mynda Samtak.

### Løgtingið má leggja á annan bógv

Tey 25 feløgini eftirlýsa einum sosial politikki, sum tekur atlit til tey, sum hava tørv á einum sosialum trygdarnetið. Í tíðindaskrivinum siga tey seg óttast gongdina og heita inniliga á politisku skipanina um at leggja á annan bógv.

-Tørvur er á raðfestingum, og at hesar eru samhaldsfastar. Hetta kann Føroya Løgting gera nakað við, nú fíggjarlógin 2010 er til viðgerðar, sláa feløgini fast.

### Sorla verandi tilboð

Feløgini heita á landsins myndugleikar um at halda ásetingarnar í ST-sáttmálanum fyri fólk við breki, og at ásetingarnar í nýggja psykiatrilógini vera virdar.

- Tað er ikki haldbart at løggeva við aðrari hondini og skerja við hinari. Samsvar má vera ímillum løggávu og fíggjarliga raðfesting. Undirritaðu feløg eftirlýsa eini greiðari og miðvísari sosialpolitiskari ætlan, sum mennir Føroya land á vælferðarøkinum, og ikki einum politikki, sum sorlar tey tilboð sum eru.

**Tey 25 feløgini, sum hava sent eftirlýsingina út eru:**
*Almanna- og heilsurøktarafelag*
*Føroya Barnabati*
*Bioanalytikarafelagið*
*Ergoterapeutfelagið*
*Epileptikarafelag Føroya*
*Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar*
*Føroya Arbeiðarafelag*
*Føroya Fiskimannafelag*
*Føroya Handverkarafelag*
*Føroya Pedagogfelag*
*Havnar Arbeiðskvinnufelag*
*Havnar Arbeiðsmannafelag*
*Heilsuhjálparafelag Føroya*
*Javni*
*Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag*
*Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag*
*Landsfelag Handverkaranna*
*Landsfelag Pensjónista*
*Ljósmøðrafelagið*
*Musikklærarafelagið*
*Magistarafelag Føroya*
*Nýrafelagið*
*S & K Felagið*
*Samtak*
*Sclerosufelagið*

# 250 milliónir til norsku fiskivinnuna

**Uppskot er lagt fyri norska Stórtingið um eina nýggja gjaldførislániskipan, ið hevur eina lánirammu á tilsamans 250 milliónir norskar krónur. Skipanin skal umsitast av Innovasjon Norge**

FISKIVINNA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Helga Pedersen, norskur fiskimálaráðharri*

Sambært norska fiskimálaráðharranum, Helgu Pedersen, fer hetta saman við øðrum tiltøkum at tryggja, at fiskiskapurin í 2010 kann fara fram so vanligt sum møguligt.

Uppskot er eisini lagt fyri Stórtingið um at tillaga málbólkin, ið er fevndur av verandi garantirammu á 97,5 mió.nkr., soleiðis at garantiirnir koma at galda fyri alla móttøku av fiski og uttan avmarkingar í mun til uppbygging av goymslu.

Norska stjórnin ber ótta fyri, at partar av fiskivinnuni ikki hava nøktandi gjaldføri til at tryggja neyðugu móttøkuorkuna til at avgreiða toskafiskiskapin í 2010. Hetta kann viðføra óhepnar avleiðingar fyri fiskimenn og tær bygdir, ið liva av toskafiskiskapinum. Stjórnin kann kortini ikki endurrinda vinnuni tey tap hon hevur havt, og við einari nýggjari gjaldførislániskipan og tillagaðum garantirammum ynskir stjórnin tí at geva sítt íkast til at bøta um gjaldførisavbjóðingina, sum nógvar fiskivinnufyritøkur hava.

Tað verða framvegis stillað krøv til kredittvirði hjá fyritøkunum, og um tær skulu fáa lut í gjaldførislánunum ella garantirammuni, er eisini neyðugt, at peningastovnarnir luttaka við at átaka sær partar av økta váðanum.

Gjaldførislán kunnu játtast upp til 3 ár, og skulu latast við vanligum treytum. Gjaldførislánskipanin kemur ikki í staðin fyri vanligar rakstrarfíggingar, men er ætlað at styrkja fíggjarliga grundarlagið í feløgunum.

Hóast Stórtingið fyrst má samtykkja bæði gjaldførislániskipanina og tillagingarnar av garantiskipanini, áðrenn Innovasjon Norge kann geva nakra endaliga tilsøgn, mælir norski fiskimálaráðharrin einstøku fyritøkunum til at seta seg í samband við Innovasjon Norge, fyri at kanna, hvørjar møguleikar tær hava at fáa tilsøgn um lán og garantiir., skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu síni.

## Tvingilssøla yvir smápartar í Sp/f X-Fish

**Týsdagin tann 20. oktober 2009, kl 09.30** verður á Dómaraskirvstovuni, rættarsali IV, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir smápartar áljóðandi tilsamans kr. 111.000,00 í Sp/f X-Fish, skrás. nr. 4188, c/o Svanur Tór Sveinsson, Skinnstakkur 6, 530 Fuglafjørður. Samlaði smápartapeningurin í Sp/f X-Fish er áljóðandi kr. 333.000.

Fyrireikandi tvingsilsølufundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn **týsdagin, tann 29. september 2009 kl. 9.45**, og verður tann, ið metir seg at hava veð ella onnur rættindi í smápørtunum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, adv., Yviri við trond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260, www.lawfirm.fo** (sak nr. 4918501), sum kann geva nærri upplýsingar um smápartarnar.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í samband við tvingilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tlf. 311003 (sak nr. AS 2-12/2009).

Føroya Fútarættur, tann 26. august 2009

Lesið Sosialin